# Hvussu rakar pensjónsnýskipanin framtíðar YTF-pensjónistin

*Limirnir í YTF eru, sum vera mann, sera ymiskir tá tað um pensjónsuppsparing ræður. Ymiskt er hvussu leingi spart verður upp til pensjón og eisini er ymiskt, hvussu lønarlagið er gjøgnum arbeiðslívið. Hóast hetta, fara vit at gera eina meting av, hvussu tveir miðal limir í YTF verða raktir av pensjónsnýskipanini.*

## Ein røð av fortreytum avgerandi

Ein røð av fortreytum liggur handan útrokningarnar. Nakrar av fortreytunum eru, at spart verður upp í 37 ár, øll uppsparing er forskattað og 18% av løn fer til pensjónsuppsparing. Uppsparingin verður útgoldin sambært eftirlønarlógini soleiðis, at 45% av uppsparingini verður útgoldin sum lívrenta, 15% verður útgoldið sum kapitalpensjón og restin, ella 40% av uppsparda virðinum, verður útgoldin í 10 ár sum lutapensjón.

Síðani spyrja vit, hvør hevði keypiorkan verið, um farið hevði verið á pensjón við hesi uppsparing undir verandi skipan og teimum útgjaldsupphæddum, ið verða galdandi í 2019. Hetta verður síðani sammett við, um farið verður á pensjón undir 2020-skipanini. Vit hyggja eftir tveimum YTF-limum. Tann eini hevur mánaðarlønina kr. 28.700 og hin hevur mánaðarlønina kr. 35.000. Lønin er í báðum førum á einum stigi, ið merkir, at uppsparingin verður forskattað við 40%.

## Egininntøkan er lykilin

Avgerandi fyri niðurstøðuna er, hvørja egininntøku hesir báðir YTF-limirnir hava, tá teir fara á pensjón. Tey 15%-ini, ið verða útgoldin í einum sum kapitalpensjón, verða ikki tald við í egininntøkuna og ávirka harvið ikki mótrokningina í fólkapensjónini. Fyrstu 10 árini stendur egininntøkan tí einans av lívrentuni og lutapensjónini og frá 11. ári, stendur egininntøkan bert av lívrentuni. Tí má hyggjast eftir báðum tíðarskeiðunum, ávikavist ár 1 til ár 10 og ár 11 og fram.

| | **Mánaðarløn** kr. 28.700<br>**Skattur** 40%<br>**Uppsparing** kr. 3.652.665 | **Mánaðarløn** kr. 35.000<br>**Skattur** 40%<br>**Uppsparing** kr. 4.454.470 |
|---|---|---|
| **Árlig tøl** | **Útgjald** | **Útgjald** |
| Lívrenta 45% (árliga, meðan á lívi) | kr. 82.185 | kr. 100.226 |
| Lutapensjón 40% (árliga í 10 ár) | kr. 146.107 | kr. 178.179 |
| Kapitalpensjón 15 (eingangsútgjald) | kr. 547.900 | kr. 668.170 |
| **Egininntøka ár 1-10 (u. kapital.)** | **kr. 228.292** | **kr. 278.404** |
| **Egininntøka frá ár 11** | **kr. 82.185** | **kr. 100.226** |

*Talva 1 Lønarlagið undir uppsparingartíðini ávirkar sjálvandi uppsparda virðið og egininntøkuna.*

Undir settu fortreytunum, fær vil limurin, ið vinnur kr. 28.700 mánaðarliga, góðar kr. 3,65 mió í uppspardum virði, tá hesin gerst pensjónistur og limurin við lønini kr. 35.000, vil hava góðar kr. 4,45 mió í uppspardum virði. Uppspardu virðini ávirka egininntøkuna. Fyrri limurin kann vænta at hava um kr. 228.000 í egininntøku fyrstu 10 árini og um kr. 82.000 frá 11. ári. Somu tøl hjá limin við hægru lønini, eru ávikavist um kr. 278.000 og kr. 100.000.

## Keypiorkan ávirkast av pensjónsnýskipanini

Nú umrokna vit hesi árligu tøl til mánaðarlig tøl og hyggja eftir, hvat hesi báðir limirnir hava at liva fyri eftir skatt um mánaðin, tá teir gerast pensjónistar. Vit hyggja eftir mánaðarligu keypiorkuni. Reyðu tølini umboða keypiorkuna, um limirnir høvdu blivið pensjónistar undir fortreytunum í verandi

pensjónsskipan (útgjaldsupphæddir í 2019) og bláu tølini, um hesir gerast pensjónistar undir 2020-skipanini.

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| | **Mánaðarløn** | kr. 28.700 | **Mánaðarløn** | kr. 35.000 |
| | **Skattur** | 40,0% | **Skattur** | 40,0% |
| | **Uppsparing** | kr. 3.652.665 | **Uppsparing** | kr. 4.454.470 |
| **Mánaðarlig tøl** | | **Útgjald** | | **Útgjald** |
| Lívrenta 45% (árlig í 20 ár) | | kr. 6.849 | | kr. 8.352 |
| Lutapensjón 40% (árliga í 10 ár) | | kr. 12.176 | | kr. 14.848 |
| Kapitalpensjón 15% (eingangsútgjald | | kr. 547.900 | | kr. 668.170 |
| **Egininntøka ár 1-10 (u. kapital.)** | | **kr. 19.025** | | **kr. 23.200** |
| Samlað útgjald e skatt - 2019 støk/gift | kr. 27.273 | kr. 26.417 | kr. 31.449 | kr. 30.593 |
| Samlað útgjald e skatt - 2020 støk/gift | kr. 26.831 | kr. 25.174 | kr. 29.946 | kr. 28.289 |
| **Egininntøka frá ár 11** | | **kr. 6.849** | | **kr. 8.352** |
| Samlað útgjald e skatt - 2019 støk/gift | kr. 16.849 | kr. 15.523 | kr. 17.779 | kr. 16.453 |
| Samlað útgjald e skatt - 2020 støk/gift | kr. 17.699 | kr. 16.054 | kr. 18.827 | kr. 17.182 |

*Talva 2 Um egininntøkan gerst "ov" høg, missur ein keypiorku av pensjónsnýskipanini. Gifti pensjónisturin verður fyrst raktur.*

Í talvu 2 sæst, at óansæð um limurin vann kr. 28.700 um mánaðin ella kr. 35.000 mánaðin verkaárini, er niðurstøðan tann sama. Fyrstu 10 árini, tá lutapensjónin og lívrentan verða útgoldnar umframt fólkapensjónina, lækkar keypiorkan, um limirnir gerast pensjónistar í 2020 ella seinni, sammett við verandi skipan og úgjaldsupphæddum galdandi í 2019.

Frá 11. pensjónsári, tá bert lívrentan verður útgoldin er øvugt. Við vístu uppsparing, hevði tað tá verið ein fyrimunur, um limurin gerst pensjónistur í 2020 ella seinni.

## Økja løn og lækka pensjónsuppsparing

At rinda 18% av løn í pensjónsupparing er 6%-stig omanfyri kravdu uppsparingina sambært pensjónsnýskipanini. Spurningurin er tí, um tað er viðkomandi at lækka pensjónsinngjaldið fyri í staðin at hækka um lønarpartin.

Tað kann sýnast ógvusligt, at lækka pensjónsgjaldið heilt niður í 12%. Fyri lønina á kr. 35.000 svarar hetta til, at uppsparda virðið lækkar um kr. 1,5 mió. Ógvusliga lækkingin í uppsparda virðinum merkir, at keypiorkan fyrstu 10 árini av pensjónstilveruni lækkar um kr. 8.000 mánaðarliga. Frá 11. ári lækkar keypiorkan góðar kr. 1.000.

Verður pensjónsgjaldið ístaðin lækkað í 15%, hevur hetta ikki eins stóra ávirkan á keypiorkuna. Fyrstu 10 árini, førir ein lækking av pensjónsinngjaldinum úr 18% niður í 15% við sær, at keypiorkan lækkar um kr. 4.000 og frá 11. ári við kr. 900 krónum. At lækka pensjónsgjaldið úr 18% í 15% og leggja lækkaða pensjónsgjaldið á lønina førir við sær, at limurin fær um kr. 570 meira at liva fyri um mánaðin, meðan spart verður upp. Orsøkin til, at pensjónskeypiorkan lækkar munandi meira enn økta lønin eftir skatt er rentu-rentu ávirkanin.

Fyri at seta kr. 570 mánaðarliga eftir skatt í ein samanhang, kann roknast fram til, at um hesar kr. 570 verða nýttar til at gjalda eyka inn á eitt miðal húsalán, kann lánstíðin á húsaláninum styttast við 2 árum. Um kr. 570 hinvegin verða settar mánaðarliga í eina lutfalsliga varliga íløgu, vil upphæddin eftir somu 37 árunum, sum pensjónsuppsparingin verður framd, verða vaksnar til umleið kr. 460.000.